# Lovandi rokkur



*Credo spælir harðan og kontantan rokk*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Framførslan hjá Credo á Fjarðafestivalinum var eitt kærkomið høvi at hoyra ein tann mest lovandi kristiliga tónleikabólkin í Føroyum**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Credo hevur evnini at gerast nógv tann besti kristiligi rokkbólkurin í Føroyum, hetta vístu teir fýra tónleikararnir í bólkinum á framførsluni í Kelduni fríggjakvøldið. Grundin í bólkinum eru teir fýra Leivur á bassi, Rógvi á gittar, Hans Andrias á trummum og Alvin á gittar. Teir spæla væl og liva fullkomiliga við. Stutt sagt so rokka teir.

Tónleikurin er orkufullur og teir fýra eru ikki minni orkufullir.

## Nýtt Credo

Frásøgumaðurin Helgi Abrahamsen kunngjørdi, at her var talan um eitt heilt nýtt Credo. Við sær á pall høvdu teir fýra í bólkinum tvær songkvinnur, ið eftir øllum at døma eru vorðnar partur av Credo, í mun til restina av bólkinum, sum veruliga rokkaði tyktust hesar báðar als ikki at vera við uppá tað og stóðu nokkso hjálparleysar á pallinum. Tær báðar Asta og Signa syngja sum so væl, men teirra røddir hóska ikki til tónleikin hjá Credo. Hóast at vit í fyrsta lagnum fingu ávísar Evanescence referansur, av røddini hjá Astu saman við harða rokkinum, so bar røddin ikki heilt hesa samanbering.

## Leitandi fótafet

Stílmessiga var framførslan hjá Credo rættiliga leitandi, tey ferðast innan fyri nógvar ymiskar tónleikagreinar, og hóast løgini flest øll vóru sera góð, so er greitt, at ein sterkari reyður tráur hevði verið góður, tað virkaði stutt sagt sum fimm ymiskir bólkar. Bólkurin hevur ikki verið so virkin seinastu árini, og roynir nú at taka síni fyrstu fótafet í langa tíð, tað er tí rættiliga natúrligt, at hesi fet eru eitt sindur leitandi.

Tað var ein sterk Prix Føroyar kensla yvir framførsluni, kontanti rokkurin undir hesum kvinnurøddum virkaði ørkymlandi á sama hátt, sum Prix Føroyar veteranarnir úr MMM virkaðu á sinni. Í tí eina friðarliga lagnum riggaðu kvinnurøddirnar tó væl.

## Trummuleikarin fram á pallin

Í lagnum Stuck vísti Credo tó veruliga, hvussu góður bólkurin er, trummuleikarin sang, og hann hevur eina ordiliga feita og egna rødd, hóast hann sat aftanfyri trummurnar, var eingin ivi um, at hetta var oddamaðurin í Credo. Ynskiligt hevði verið um Credo lærdi av bólkum sum White Stripes og 200, og fluttu trummuspæli fremst í pallmyndina, so kundu kvinnurøddirnar flutt aftur á pallin og aftur í ljóðmyndina ella kanska heilt av pallinum. So tær ikki stóðu fyri oddamannin. Torir bólkurin at gera neyðugu broytingarnar, kann hetta gerast ein av okkara allar bestu bólkum. Í Stuck var nýtslan av forritaðum tónleiki serliga væleydnað, og hetta gav lagnum karakter og riggaði ótrúliga væl.

# Ungir menn við gomlum ljóði


*Proclaim spælir væl. Men tað er serliga røddin hja sangaranum, ið skarar framúr*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast Proclaim er ein bólkur av ungum, so er tað ikki ungdómsins eksperimentarandi hugur, ið merkir teirra tónleik, ið bæði var konservativur og lítið egin**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sprottin úr Heimamissións umhvørvinum er Proclaim av fólki, ið eg havi tosað við ofta lýstur, sum nýggju stjørnurnar innan tónleik í Heimamissiónshøpi. Serliga er tað songrøddin hjá sangaranum, ið verður lovprísa. Á Fjarðafestivalinum slapp eg fyrstu ferð at uppliva bólkin á konsert, og lat tað vera sagt beinanvegin, sangarin syngur sera væl. Men annars hevur bólkurin sera lítið at bjóða-

Proclaim eru skjótt fløguaktuellir, og á Fjarðafestivalinum var høvi at hoyra løg av komandi útgávuni hjá hesum nógv hypaða bólki.

## Streymurin hvarv

Framførslan var nógv seinkað av tøkniligum trupulleikum. Streymurin til stóra ljóðpultin fór undir ljóðroyndini. Tað tók yvirraskandi langa tíð at loysa henda trupulleika, men nærum ein hálvan tíma seinkaður byrjaði bólkurin at spæla.

Proclaim eigur rós fyri, hvussu væl teir loystu uppgávuna at halda lagið gott millum áhpyrararnar, ið trúgvir bíðaðu eftir, at bólkurin skuldi byrja at spæla. Við dansi og songspølum var tað eitt sindur sum at vera á ungdómslegu.

## Lítið egnir

Proclaim er ein rættiliga ungur bólkur, og tí var tað undrunarvert at hoyra, at bólkurin ljóðaði so gamal. Fyrsta lagið minti óvanliga nógv um klaksvíksbólkin Aria, niður í minstu detalju, og eina løtu helt eg, at Jógvan Hansen var komin á pall. Í næsta lagi skifti stílurin nakað, og restin av konsertina var sum at hoyra Taxi. Løgini mintu sera nógv um løg hjá Prix Føroyar vinnaranum 1999, bæði í stíli og tíanverri eisini ofta í formi, tó utttan at Proclaim tøkniliga vóru líka væl fyri sum Taxi. Teir spældu tó væl. Í stuttum ljóðaðu ungu menninir sera lítið originalir. Veðrið var vátt, og hetta gjørdi, at mannfjøldin ongantíð gjørdist ordiliga stór. Men lagið tyktist gott millum fólk.

# Sølubúðirnar vórðu fluttar inn

**Nógvar ymiskar búðir vóru á Fjarðafestivalinum, upprunliga skuldu tær vera á økinum frammanfyri Kelduna, men í illveðrinum vóru tær fluttar inn**

SØLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fjarðafestivalurin var ikki bert tónleikur, sum ein rættur festivalur hevði Fjarðafestivalurin ymiskar búðir, ætlanin var upprunaliga, at økið frammanfyri Kelduna skuldi vera søluøki burturav. Men av tí at veðrið gjørdist, sum tað varð, so varð alt handilsvirksemið flutt inn í Kelduna, og tann ætlaði talent-pallurin varð avlýstur. Eisini gekk hetta útyvir festivalbúffarnar hjá Hotel Norð, ið vóru avlýstir vegna veður, tað bar illa til at grilla teir inni, og hugsingur var ikki um, at gera nakað tílíkt uttandura.

Hinar búðirnar vóru, eftir eitt væleydnað hóskvøld í teltinum fluttar inn. Í sølusalinum kundi man t..d. klippa sær, ella vitja Gjamma, ið selur alt innan kristiligan tónleik, millum annað útgávur hjá luttakandi bólkum. Til bar eisini at keypa sær eina nýggja troyggju ella skóleistar frá Tøting, ella okkurt av hinum, ið ymisku búðirnar høvdu at bjóða.

Nógva regnið leygardagin gjørdi tó, at ein vøra var nógv tann mest populera, tað vóru regnskjólini, ið tíanverri dekan ov tíðliga vórðu útseld.